# Minningarorð um Ingu Falkvard Danberg

*Sakníð tungan harmin vekur,*
*at so dátt vit mistu teg,*
*Harrin gevur, Harrin tekur,*
*ei vit skilja Harrans veg;*
*ei á foldum finnist tann,*
*lívsins gátu grunda kann:*
*Best sum sólin fagrast skínur,*
*deyðin inn um dyrnar trínur.*



Mikudagin 20. mars andaðist Inga Falkvard Danberg bert 32 ára gomul.

Fýra dagar seinni varð Inga borin út úr Ebenezer, har ein tann størsta mannamúgvan tú hevur sæð til eina jarðarferð fylgdi Ingu til hennara seinasta hvíldarstað. Familjan, vinir og øll tey mongu, sum høvdu eitthvørt tilknýti til Ingu, vóru henda dagin til eina stórsligna, rørandi og minniliga løtu, sum ongantíð verður gloymd.

Tær vantar orð, tá ið tú skalt bera einum vini, einum hondbóltsvini, sum tú hevur havt nært tilknýti til í mong ár, eina seinastu heilsan.

Tá ið gomul fólk fara, hava vit oftast natúrliga vant okkum við tankan. Vit hava avgreitt flestu viðurskifti við viðkomandi og góðtaka, at soleiðis eigur tað bara at vera. Men tá ið ung fólk fara, so kennist tað, sum vit ikki hava avgreitt alt við viðkomandi. Soleiðis er tað eisini við Ingu. Tað er so nógv, sum tú nú kundi hugsað tær at spurt og tosað við Ingu um, nógv sum vit ikki fingu tosað um og avgreitt í dag, men sum kundi bíða til ein annan dag. - Alt er bara so endaleyst.

Torført at venja seg við tankan ongantíð at síggja Ingu aftur, ongantíð at síggja hetta bersøgna, positiva og glaða menniskja aftur á hesari fold.

Kom at kenna Ingu - henda sjáldsama ágrýtna hondbóltsspælara - gjøgnum ítróttin.

Sum smágenta fekk Inga áhuga fyri ítrótti, og kom ítróttarlívið at verða ein stórur partur í lívi hennara. Hon var gentan, sum skjótt gjørdi seg galdandi í skúlaítróttardøgunum. Hon var sterk, rann skjótt, hoppaði høgt og langt og henni dámdi væl at kappast.

Inga royndi seg í fleiri ítróttargreinum, millum annað spældi hon flogbólt og fótbólt. Hennara dagliga starv kom eisini at hava samband við ítrótt, tí í mong ár arbeiddi hon í ítróttarhandli í Havn.

Men tað var í hondbóltinum í Neistanum, at nógv av okkum komu at kenna Ingu.

Hálvvaksin kom hon at spæla hondbólt í felag okkara. Hetta verður í dag mett at vera seint at byrja at íðka eina ítróttargrein, tá ið hugsað verður um tekniskan førleika í spælinum. Nú koma børn til minihondbólt, áðrenn tey fara í skúla.

Inga hevur vunnið mangt FM heitið í hondbólti - í gentum 16 ár, kvinnuunglingum og í 1. deild.

Inga var neistakvinna við stórum N, um tú kanst siga tað soleiðis. Umframt at ganga á odda í venjing og dystum, so sat hon við dómaraborðið og var til dystin fús, tá ið ymisk tiltøk skuldu fyriskipast.



Inga var bersøgin. Hon hoyrdist og sást, tá ið hon var í hallunum. Hon legði nógv í venjingina og kravdi nógv av sær sjálvari og viðspælarum í dystum. Tað var onkuntíð torført hjá teimum ungu spælarunum at venja seg við, tá ið Inga segði sína meining í dysti ella undir venjing. Inga meinti tað væl, tí hon visti, hvat kravdist, um neistaliðið skuldi náa oddin í 1. deild.

Soleiðis var Inga bara, og øll høvdu virðing fyri sterka liðskiparanum við gula liðskiparaarmbindinum um vinstra arm og 6 talinum á rygginum.

Hon byrjaði sum linjuspælari, men kom skjótt at spæla vinstri bakkur í verju og í álopi. Inga var ein av Føroya bestu verjuspælarum og hevði eitt hoppskot, sum var í serflokki, tá ið hon fekk tað at rigga, og sum mótstøðuliðini altíð máttu varða seg fyri.

Hon gekk í onkrum dysti mestsum ov nógv upp í spælið og var so spent, at tað gekk út yvir dygdina. Hon vildi altíð útinna eitt gott avrik, og tað sást á kropsburðinum, um Inga var nøgd ella ónøgd við seg sjálva.

Inga hevði ongar trupulleikar, tá ið hon skuldi skifta frá gerandisklæðunum og í 60 ára- ella mótaklæði, tá ið Neistin skipaði fyri onkrum tiltaki. Í skemti plagdu vit at siga við hana, at tað var so lætt hjá henni at fara upp á pallin, tí hon hevði viðfødda gongulagið til endamálið. Hetta dámdi henni lítið at hoyra.

Eftir eina skurðviðgerð í fjør vildi Inga so fegin koma aftur á 1. liðið í vetur. Hon fekk eftir skurðviðgerðina ikki høgra arm heilt at makka rætt, men eftir at hava spælt nakrar dystir í 2. deild gekk framá, og hon kom aftur á 1. liðið. Men løtan gjørdist stokkut, tí Inga spældi sín síðsta hondbóltsdyst í Vági 6. januar í ár.

Sorgin er stór í Neistanum, men nógv størri hjá familjuni. Vit vóna, at tit fáa stuðul í hesi sváru tíð. Eitt orðafelli, sum tikið verður til, ljóðar, at tá ið ein hurð verður latin aftur, syrgir Várharra altíð fyri, at eitt vindeyga verður latið upp. Gævi hetta orðafelli gerst veruleiki í sorgini.

Góða Inga. Tú hevði eitt so positivt lyndi, sum gjørdi teg til ein góðan hondbóltsspælara og gott menniskja. Komi at hugsa um nógvu samrøðurnar við teg um hondbólt og tað, sum tú eisini hevði áhuga í í frítíðini. Tú plagdi at siga frá hendingum í Mykinesi, eitt fríplláss, sum tú hevði so stóran tokka til.

Vit takka tær fyri alt, sum tú gavst okkum í viðføri. Í Neistanum verður tú nógv saknað. Hvíli tú í fríði.

**Vagnur**

# Adolf Olsen farin



Páskaaftan fór Adolf Olsen í Søldarfirði til jarðar úr Glyvra kirkju. Mikudagin 27. mars andaðist hann á Landssjúkrahúsinum eftir stutta sjúkralegu.

Adolf var 91 ár, nú hann fór. Í blaðsamrøðu, Sosialurin hevði við hann frammanundan 90 ára føðingardag hansara, segði hann í stuttum frá lívi sínum, einki hóvastók gjørdi hann burturúr sær.

Adolf var føddur í Søldarfirði 21. november 1910, og vóru foreldur hansara Malena, ættað av Toftum og Jóan Jakku úr Søldarfirði.

Sámal og Marjun vóru børnini hjá Lottu og Adolfi. Lotta, sum var úr Rituvík, andaðist í 1997. Sonurin Sámal, prentari í Havn í mong ár, doyði í 1991, 46 ára gamal.

Serligur hugni var at støkka inn á gólv hjá Lottu og Adolfi, eisini á ellisárum, og fegin vóru tey, at dótturin og versonurin Piddi og børn teirra, vóru um tey.

Hugaligur var Adolf at koma á tal við, heilsuna hevði hann góða langt upp í árini, og dámdi honum at koma á tal við fólk, har vóru mangar góðar løtur.

Adolf var skipsmaður í 30 ár, sluppfiskimaður tey flestu, eisini var hann við trolara, sum skipari ella stýrimaður. Tá hann legðist uppi, fór hann í byggivinnuna, at stoypa og smíða hús.

Adolf var misjónsmaður, tí duldi hann ikki fyri, meira enn 23 ár sat hann í stýrinum fyri missiónshúsið í Søldafirði.

Hann stuðlaði Javnaðarflokkin, eisini sum stillari og valevni. Poul Karbech Mouritsen, prentsmiðjustjóri, sáli, sum annars var lærumeistari Sámals, soni Adolfs, hevði á munni týdningin tað hevði, at blaðseljarin fekk Sosialin rættstundis og at hava trúgvar blaðseljarar, húsið hjá Adolfi var eitt teirra.

Frið lýsa vit yvir minni um Adolf Olsen í Søldarfirði.

**jl**

# ítróttur

Nr. 62 • mikudagur • 3. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hann brúkar meira enn hálva arbeiðsviku til talv hvørja viku



*Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði er nýggjur føroyameistari í talvi, men enn eru nógvar avbjóðingar fyri framman hjá unga telvaranum*

**Hans Kristian Simonsen, sum er næstyngsti FM vinnarin nakrantíð, hevði roknað við, at hann fór at enda millum teir allar bestu**

FM Í TAVLI
*Jóannes Hansen*

Í gjáramorgunin var páskafrítíðin liðug hjá 18 ára gamla Hans Kristiani Simonsen í Kollafirði. Tá tørnaði hann til aftur á Fiskavirking í Vestmanna. Tað var har, hann var staddur, tá hann í sjónvarpinum í fjør greiddi frá, hvussu tað var at vinna á Kasparov.

Í páskafrítíðini hevur ungi maðurin ikki ligið á løtu síðuni. Hann hevur fyri tað mesta verið vesturi á Giljanesi, har hann luttók í FM kappingini fyri einstaklingar. Og tað gekk væl. Ja so mikið væl, at Hans Kristian Simonsen gjørdist meistari.

Hann er triði unglingurin, sum hevur vunnið FM heitið, og hann er tann næstyngsti meistarin nakrantíð. Tá Jens Christian Hansen av Toftum í 1979 vann sítt fyrsta av fýra FM heitum, var hann 18 ár og ein mánað gamal. Tá var hann yngsti FM vinnarin nakrantíð, og tað metið hevur eingin tikið enn. Hans Kristian er 18 ár og fýra mánaðir gamal, og hann er næstyngsti FM vinnarin nakrantíð. Hin unglingin, sum hevur vunnið FM, er fleirfaldi meistarin Heini Olsen úr Klaksvík, sum vann FM fyri fyrstu ferð í 1989.

Rani Nolsøe er formaður í Talvsambandi Føroya. Hann fegnast um, at eitt nýtt ættarlið av telvarum hesa ferð rættuliga gjørdi um seg, og hann heldur, at nýggi meistarin hevur góðar møguleikar at koma langt:

– At Tiger Hilbert–Persson úr Svøríki eitt skifti var í Kollafirði var góður íblástur eitt nú hjá Hans Kristiani. Hann er teoretiskt sterkur. Hóast sín unga aldur hevur hann ein búnan stíl, og hann telvar við djúpari talvfatan. Hesa seinastu tíðina er hann mentur ógvuliga nógv. Tað sást aftur á styrkistalinum, staðfestir formaðurin í Talvsambandinum, sum heldur, at nýggi meistarin er stinnur í øllum fasum í telvingini, og at hann er sera stinnur í miðspælinum og endaspælinum.

## Rokningin og fyrireikingin

Tá vit spyrja nýggja FM vinnaran, um hann hevði roknað við, at hann skuldi vinna FM, so svarar hann soleiðis:

– Eg hevði í hvussu so er verið sera vónbrotin, um eg ikki hevði endað millum tríggjar teir fremstu. Eg var styrkismettur millum fýra teir bestu. Undan næstsíðsta umfarinum roknaði eg við, at um tað eydnaðist at fáa hálvt annað stig í tveimum teimum síðstu umførunum, so fór tað at eydnast, og tað gekk akkurát soleiðis. Næstsíðsta umfarið var eitt skjótt remis. Tað hevði við sær, at eg hevði møguleikar at hvíla og fyrireika meg til síðsta talvið, sum eg visti, at eg skuldi vinna. Martin Poulsen og eg búðu saman, so vit sótu saman og fyrireikaðu okkum. Mótstøðumaðurin hjá honum í síðsta umfarinum var John Rødgaard, sum eg kappaðist við um fremsta plássið. Vit báðir Martin høvdu m. a. fleiri talv hjá John fyri okkum, og tað kom væl við hjá mær, at tað eydnaðist Martini at vinna á John.

Tú tapti einki talv?

– Nei, og eg kendi tað heldur ikki soleiðis, at eg nakrantíð var so mikið kroystur, at tað var um reppið, at eg kundi tapa. Tí kann eg ikki annað enn vera væl nøgdur við hesa kappingina, heldur Hans Kristian Simonsen.

At hann vann FM er ikki komið av ongum:

– Eg brúki einar tveir tímar um dagin uppá talv. Uppundir kappingar brúki eg meiri tíð til fyrireiking, og sunnudagar luttaki eg í online kappingum hjá World Chess Network. Talan er um altjóða kappingar, og eg kenni fleiri av teimum, sum eg kappist við.

Hvussu leingi hevur tú verið bitin av talvinum?

– Eg lærdi mannagongdina, tá eg var eini seks ára gamal. Hanus Joensen, sum var skúlastjóri í Kollafirði, var ein góður telvari. Hann vann FM í 1977. Tað smittaði av sær, og eg rokni við, at øll skúlabørnini í bygdini dugdu mannagongdina. Tá Tiger kom til Kollafirðar, var eg 13–14 ára gamal. Tá fekk eg so at siga blóð á tonna og fór at lesa og studera talv. Tá fór at ganga skjótt rætta vegin.

## Avbjóðingarnar

Tá vit spyrja nýggja FM vinnaran úr Kollafirði, hvørjir dreymarnir eru, so eru fleiri, sum hann ætlar at gera til veruleika:

– Eg fari at luttaka í fleiri einstaklingakappingum í ár, og so er tað talvolympiadan. Millum einstaklingakappingarnar eru HM og EM fyri unglingar. Í fjør luttók eg í HM kappingini fyri telvarar yngri enn átjan ár. Tann kappingin var í Spania. Eg endaði sum nummar 30 av 80 telvarum. Tað var eg væl nøgdur við. Nú skal eg luttaka í kappingini fyri telvarar yngri enn 20 ár. Um tað eydnast at røkka somu endastøðu, so verði eg nøgdur við tað, heldur Hans Kristian Simonsen.

Síðst í oktober skal føroyska talvlandsliðið luttaka í talvolympiaduni, sum hesa ferð verður í Bleb í Slovenia. Liðið plagar at vera mannað við seks telvarum, og sambært formanninum í Talvsambandi Føroya, so er føroyameistarin sjálvskrivaður luttakari:

– Tað havi eg ongantíð roynt áður. Eg havi hoyrt og lisið um talvolympiadurnar. At stríðast saman við góðum føroyskum telvarum í størstu liðkappingini av øllum, tað verður sera spennandi og ein stór avbjóðing.